## HEILSANIR



**Góði abbi**
Lukku og gleði á tínum stóra føðingardegnum 30. mars. Vit eru góð við teg. Heilsan vit Millum Gilja 71.
**Lítla Sigga og Eyðun Tage**



**Hey góði, elskaði Hans Pauli**
Tillukku við 50 ára degnum tann 31. mars. Tú heldur tær bara heilt væl! Takk fyri alt tú ert fyri meg. Alt tað besta ynski eg tær í framtíðini
**Kona tín**



**Hey HPJ!**
Tillukku við teimum 1/2 hundrað tann 31. mars. Vónandi verður skilið eitt sindur betur á tær nú leygarkvøldið. Takk fyri alt, ynskja
**m&m&m**



**Góði Tage**
Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum. Alt gott í framtíðini.
**Ynskir konan við familju**



Lítla fitta hjarta okkum er 1 ár í dag.
**Omma**



**Góði elskaði Bogi**
Hjartaliga tilluku við 2 ára degnum 29. mars.
**Ynskja omman og abbin á Sandi**



**Góði Samson**
Hjartaliga tillukku á 4 ára føðingardegnum í dag. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Bestu heilsanir omma og abbi í Havn**

---

**30,- kr.** Sosialurin

**Heilsanir**

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ........................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

---

# Bárður Jákupsson í Galerie Focus

**Fríggjadagin letur upp framsýning við verkum hjá Bárði Jákupsson upp í Galerie Focus í Havn**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Við á framsýningini eru 20 málningar og 10 akvarellir. Bárður Jákupsson hevur verið sera virkin, at skriva greinar og bøkur um føroyska list og soleiðis gjørt føroyska list kenda í útlondum.

Málningalist hansara kenst av einum hugburði til litir, ið er knýttur at vøkstri og grøði í teirri sansaðu náttúruni, og fríðari og rytmiskt livandi pensilsskrift, sum - stílistiskt og grafologiskt - eyðkennir bæði listamansins mensku megi og fína musikalitet. At kalla Bárð Jákupsson abstraktan hevði verið tað sama sum at avdúkað tørvandi kunnleika til teir náttúrurunnu formar og litir, ið umgeva hann í gerandisdegnum, og sum staðiliga geva honum íblástur, sjálvt tá ið hann hevur teir ikki fyri eygunum í málaraverkstaðnum, framman fyri myndafótinum. Og at rópt hann modernist hevði verið at skúgvað til viks hansara samskifti við málningsins ástøðiligu framburðsmøguleikar.

Bárður Jákupsson er ekspressionistur eftir náttúrunnar treytum, og hann kennir sum fáur møguleikan hjá pensilsstrokunum til at tala við kalligrafiskum máli, til bæði at sleppa tí gamla heiminum og avdúka ein nýggjan. Tvey sløg av náttúru møtast í listini hjá Bárði Jákupssyni: málningsins náttúra - og Føroya, og tær eru felags um at vera í sterkari rørslu og støðugari broyting.

Framsýningin verður opin til 15. apríl.

---

# Nýggjur formaður í Fíggingargrunninum

**Fyrrverandi sparikassastjóri er nú formaður í grunninum, sum eigur Føroya Banka**

NEVNDARVAL
*Jákup Mørk*

Bárður Nielsen, landsstýrismaður, hevur nú valt nýggja nevnd til Fíggingargrunnin frá 1992. Hetta er grunnurin, sum danir og føroyingar settu á stovn í samband við bankabjarginina.

Eyðun á Rógvi, fyrrverandi. sparikassastjóri, er nýggjur nevndarformaður í grunninum. Hann tekur við eftir John P. Danielsen, sum hevur verið nevndarformaður seinastu tvey skeiðini, men sum ikki ynskti at halda fram í nevndini.

Soleiðis sær nevndin fyri Fíggingargrunnin frá 1992 soleiðis út. Eyðun á Rógvi, formaður, Eyðfinn Færo, Hildur Gunnarsdóttir og Eyðhild Skaalum.

Viðtøkurnar fyri grunnin áseta, at tey fýra, sum landsstýrismaðurin velur í nevndina, í felag kjósa fimta nevndarlimin. Seinasta valskeiðið hevur Niels Sørensen úr Havn verið fimti nevndarlimurin.

Valskeiðið fyri nevndina er trý ár, og skal nýggja nevndin sostatt sita fram til 31. mars 2008.